# verandi



Hann mintist frá barnadøgunum, hvussu hugnaligur handilin var, men helt, at tað var nyttuleyst, tá rullugardinur fjaldi umhvørvið har.

Edward visti, at handilin kundi nýtast til eitthvørt endamál og gjørdi av at geva mentanini innivist har. Klaksvík var fiskivinnubýur burturav, og umframt í samkomum og innan ítrótt, hendi ikki so nógv. Hann vildi hava fólk at koma inn í handilin, blaða í eini bók – hon bítur jú ikki. Tíma fólk ikki at lesa bókina, kundu tey lesa um innihaldið á baksíðuni – so høvdu fólk ið hvussu er fingið okkurt út aftur við sær. Tímdu tey ikki at keypa fløgur, so kundu tey lurta eftir onkrum lagi o.s...fr.

– Bara tað at koma inn í handilshølini og kenna mentanarliga súsið, skuldi vera ein uppliving í sjálvum sær. Tað unti eg fólki, sigur Edward.

Lat fara at talan ikki er um yvirskotshandil, tí tað var ongantíð ætlað sum handilsligt virksemi burturav.

Endamálið við tiltakinum var at geva fólki eina øðrvísi uppliving.

**Umráðandi at samleikin fylgir tær**

Edward heldur ikki, at tað ger nakað, um tað manglar eitt ð í eini bók, men um tað manglar eitt null á botnlinjuni í roknskapinum, kann tað fáa katastrofalar fylgir.

Sjey ár eru liðin, síðani handilin læt upp. Í fyrstuni seldi hann fløgur og plakatir, men við tíðini mentist virksemið, sum nú, umframt at selja bøkur, fløgur og filmar, eisini umfatar listaframsýningar, konsertir og bókakvøld, og kafé er eisini er í hugnaligu, gomlu hølunum. Hetta tiltakið var ætlað klaksvíkingum í fyrstuni, men sum fráleið hava eisini fólk kring landið fingið áhuga at vitja í ”Leikalund”.

– Eg havi ikki stundir at vera við í hesum arbeiði longur, men eg vóni, at tað kann liva víðari, sigur Edward, sum ætlar sær at verða verandi í Klaksvík. Hann fer í næstum út at ferðast og hevur fingið møguleikan at fara til Roma at arbeiða í tveir mánaðir.

– Tað er spennandi at vita, hvat fer at henda, tó er tað umráðandi at samleikin fylgir tær, tí tá kanst tú altíð mennast í tínum listaarbeiði, sigur Edward Fuglø.